# Bert eitt nýtt met

*Undanfarna vikuskifti var FM kapping í svimjing, og hóast vinnararnir vóru eins nógvir og vanligt, so varð bert eitt nýt met sett*

Jákup Mørk

Hetta metið áttið Karin Gaardlykke, sum svam 800 m frí í tíðini, 9.47.75.

Hetta, at bert eitt met varð sett, hevur fingið mong at rysta við høvdinum, og spyrja, um framgongdin, sum føroyska svimjingin hevur staðið fyri, er steðgað, ella um tað eru onnur viðurskifti, sum gera seg galdandi.

Katrin Joensen, sum er skrivari hjá svimjisambandinum, sigur við Sosialin, at í hennara verð eru fleiri orsøkir til, at so varð.

### Samstarvið riggaði ikki

Við byrjan av svimjiárinum, í september mánaði í fjør, setti svimjisambandið út í kortið, at landsliðssvimjararnir alla tíðina skuldu hava nakrar avbjóðingar fyri framman, sum strembast kundi fram ímóti.

Frammanundan hevur tað annars ofta verið so, at tað bert hava verið oyggjaleikirnir, sum jú eru annað hvørt ár, sum svimjararnir hugsaðu um, og at teir tískil ikki vóru nóg væl fyri tey árini, har oyggjaleikirnir ikki vóru á skránni.

Til uppfylging av hesi ætlan setti svimjisambandið ein franskan venjara, men hóast maðurin ivaleyst hevur stórar dygdir sum svimjivenjari, so riggaði samstarvið við svimjisambandið ongantíð, og um ársskiftið varð so avgjørt at steðga samstarvinum.

Júst hvat hendi og hví tað hendi, eru ivaleyst fleiri orsøkir til, men hetta noyðast tey í svimjisambandinum bara at taka til eftirtektar.

Annars heldur Katrin, at laku úrslitini í ár ikki skulu takast sum ein eksponentur fyri gongdina í føroyskari svimjing, men at hon metir hetta sum eitt einsamalt dømi.

Víðari sigur hon, at hóast fleiri av »gomlu« svimjarunum ikki vóru eins væl fyri í ár, sum teir onkuntíð hava verið, so eru framvegis nógvir ungir svimjarar á veg, sum avgjørt hava eina stóra framtíð innan ítróttina, um rætt verður borið at.

### Fundast um vikuskiftið

Júst hvat verður gjørt komandi tíðina, fyri at fáa gongd aftur á menningina, er ikki enn avgjørt, men komandi vikuskifti verður tann sonevndi kalendarafundurin hildin við svimjifeløgini í landinum, og her verður evnið uttan iva tikið upp.

Kalendarafundurin er ein árligur fundur, har Svimjisambandið saman við svimjifeløgunum leggur komandi kappingarár til rættis, og síðani verður tikið saman um árið, sum farið er.

Umframt fundin við svimjifeløgini, fær svimjisambandið tá eisini vitjan av fyrrverandi venjaranum hjá danska svimjisambandinum, Flemming Poulsen, sum fer at siga frá sínum hugsjónum um, hvørjir lutir skulu fáast upp á pláss fyri at tryggja framgongdini.

Tað hevur ljóðað, at svimjisambandi og Flemming eisini skulu samráðast um, hvørt danin verður nýggjur landsliðsvenjari hjá Føroyum, men hetta vil Katrin Joensen ikki gera beinleiðis viðmerkingar til.

- Um tað kemur so langt, at partarnir gera av at fara í samstarv, verður eisini neyðugt at seta fólk her heima, tí Flemming Poulsen er búsitandi í Sveis. Hann kann tískil ikki vera her alla tíðina, so á onkran hátt noyðist talan tá at verða um eitt kompromis millum partarnar, sigur Katrin, uttan tó at vilja vátta ella avsanna, at samráðingar eru í gongd millum partarnar.

# Úrslitini av FMkappingini í svimjing 2000:

**400 m blandað, kvinnur:**
1 Katrin Sørensen HS 5.45.34
2 Annika Jacobsen HS 6.00.51
3 Inga Katrin Winther HS 6.19.26

**100 m bringa, menn:**
1 Asbjørn Hansen HS 1.08.94
2 Jógvan Joensen HS 1.14.11
3 Hallur Stakksund HS 1.15.86

**100 m firvald, kvinnur:**
1 Shaila Millum Garðarnar TS 1.12.77
2 Sólvá Dam HS 1.15.76
3 Cecilia N. Poulsen TS 1.18.42

**200 m blandað, menn:**
1 Eivind Eysturoy HS 2.20.59
2 Andrass Thomsen HS 2.22.75
3 Jóannes á Fløtti HS 2.29.13

**50 m bringa, kvinnur:**
1 Benthe Sikivat Andersen TS 0.37.45
2 Elisabeth Rasmussen HS 0.38.43
3 Eyðbjørg Robertson TS 0.39.57

**50 m rygg, menn:**
1 Bogi Lenvig HS 0.29.81
2 Eivind Eysturoy HS 0.29.90
3 Heini Harryson HS 0.30.39

**200 m frí, kvinnur:**
1 Karin Gaardlykke HS 2.15.36
2 Shaila Millum Garðarnar TS 2.17.39
3 Rannvá Jacobsen HS 2.18.21

**200 m firvald, menn:**
1 Hallur Stakksund HS 2.24.53
2 Andrass Thomsen HS 2. 30.77
3 Kristoffur Hentze HS 2.33.12

**50 m rygg, kvinnur:**
1 Benthe Sikivat Andersen TS 0.34.12
2 Rannvá Jacobsen HS 0.34.49
3 Katrin Sørensen HS 0.34.77



*Shaila millum garðarnar varð ársins svimjari hjá kvinnum*

***Mynd: Sofus Johannesen***

**1500 m frí, menn:**
1 Bogi Lenvig HS 17.51.47
2 Jóan Petur Joensen HS 20.38.23
3 Rókur í Jákupsstovu Flot 21.30.97

**4x200 m frí, kvinnur:**
1 HS 1 9.42.60
Karin Gaardlykke, Rannvá Jacobsen, Rúna Jacobsen og Sólvá Dam
2 HS 2 9.56.41
Durita Hansen, Katrin Sørensen, Lisbeth Joensen og Maria í Brekkunum
3 HS 3 10.11.98
Elisabeth Rasmussen, Arndis Andreasen, Annika Jacobsen og Brynhild Jónsdóttir

**4x100 m blandað, menn:**
1 HS 1 4.19.43
Bogi Lenvig, Asbjørn Hansen, Kristoffur Hentze og Eivind Eysturoy
2 HS 2 4.37.53
Jóannes á Fløtti, Kim Bogi Jacobsen, Andrass Thomsen og Mourits Danberg
3 HS 3 4.54.39
Janus Olsen, Niclas Olsen, Jóhan Joensen og Gudmundur Joensen



*Einasta metið í ár setti Karin Gaardlykke í 800 m frí. Hon hevði tíðina 9.47.75*

***Mynd: Sofus Johannesen***

**400 m blandað, menn:**
1 Bogi Lenvig HS 5.07.27
2 Jóannes á Fløtti HS 5.13.78

**100 m rygg, kvinnur:**
1 Benthe Sikivat Andersen TS 1.13.01
2 Rannvá Jacobsen HS 1.13.10
3 Rúna Jacobsen HS 1.15.48

**100 m firvald, menn:**
1 Hallur Stakksund HS 1.04.01
2 Kristoffur Hentze HS 1.04.03
3 Heini Harryson HS 1.05.30

**200 m blandað, kvinnur:**
1 Katrin Sørensen HS 2.39.89
2 Sólvá Dam HS 2.41.79
3 Annika Jacobsen HS 2.50.85

**50 m bringa, menn:**
1 Asbjørn Hansen HS 0.31.34
2 Dia Jacobsen HS 0.32.59
3 ógvan Joensen HS 0.33.72

**50 m firvald, kvinnur:**
1 Shaila Millum Garðarnar TS 0.31.65
2 Karin Gaardlykke HS 0.34.04
3 Sólvá Dam HS 0.34.16
*Shaila Millum Garðarnar setti í hesari kapping nýtt bólkamet í bólki 5.*





*Jóannes á Fløtti úr Havnar Svimjifelag gjørdist Grand Prix vinnari hjá monnum*

***Mynd: Sofus Johannesen***

**200 m frí, menn:**
1 Bogi Lenvig HS 2.05.42
2 Andrass Thomsen HS 2.08.81
3 Mourits Danberg HS 2.12.31

**200 m bringu, kvinnur:**
1 Katrin Sørensen HS 2.55.42
2 Eyðbjørg Robertson TS 3.05.54
3 Hildur Jacobsen HS 3.11.27

**50 m frí, menn:**
1 Eivind Eysturoy HS 0.24.96
2 Kristoffur Hentze HS 0.25.79
3 Dia Jacobsen HS 0.25.89

**800 m frí, kvinnur:**
1 Karin Gaardlykke HS 9.47.75
2 Annika Jacobsen HS 10.54.08
3 Guðrun Magnussen HS 11.12.28
*Karin Gaardlykke setti í hesari kappingini nýtt føroyskt met og bólkamet í bólki 5.*

**4x200 m frí, menn:**
1 HS 1 8.43.16
Andrass Thomsen, Kristoffur Hentze, Bogi Lenvig og Gudmundur Joensen
2 HS 2 8.59.15
Jóannes á Fløtti, Hallur Stakksund, Jóhan Joensen og Mourits Danberg
3 HS 3 9.27.13
Heini Harryson, Janus Olsen, Kim Bogi Jacobsen og Bárður Klein

**4x100 m blandað, kvinnur:**
1 HS 1 4.58.40
Rannvá Jacobsen, Katrin Sørensen, Sólvá Dam og Rúna Jacobsen
2 TS 1 5.01.04
Sára Ejdesgaard, Benthe Sikivat Andersen, Shaila Millum Garðarnar og Cecilia N. Poulsen
3 HS 2 5.14.04
Durita Hansen, Elisabeth Rasmussen, Lisbeth Joensen og Maria í Brekkunum

**400 m frí, kvinnur:**
1 Karin Gaardlykke HS 4.47.17
2 Rannvá Jacobsen HS 4.47.61
3 Sólvá Dam HS 5.05.56

**100 m frí, menn:**
1 Eivind Eysturoy HS 0.55.00
2 Kristian Olsen Ægir 0.59.90
3 Jóhan Martin Poulsen Flot 1.00.26

**100 m bringu, kvinnur:**
1 Benthe Sikivat Andersen TS 1.22.87
2 Katrin Sørensen HS 1.23.70
3 Elisabeth Rasmussen HS 1.23.80

**200 m rygg, menn:**
1 Jóannes á Fløtti HS 2.28.25
2 Janus Olsne HS 2.40.89

**50 m frí, kvinnur:**
1 Shaila Millum Garðarnar TS 0.29.30
2 Karin Gaardlykk HS 0.30.47
3 Cecilia N. Poulsen TS 0.30.73

**50 m firvald, menn:**
1 Eivind Eysturoy HS 0.27.60
2 Dia Jacobsen HS 0.27.67
3 Bogi Lenvig HS 0.28.13

**200 m rygg, kvinnur:**
1 Rannvá Jacobsen HS 2.39.63
2 Arndis Andreassen HS 2.43.13
3 Durita Hansen HS 2.44.00

**400 m frí, menn:**
1 Bogi Lenvig HS 4.28.96
2 Andrass Thomsen HS 4.43.47
3 Mourits Danberg HS 4.54.73
4 Jóan Petur Joensen HS 4.57.30
*Jóan Petur Joensen setti í hesari kappingini nýtt bólkamet í bólki 3.*

**100 m frí, kvinnur:**
1 Shaila Millum Garðarnar TS 1.03.53
2 Karin Gaardlykke HS 1.04.89
3 Rúna Jakobsen HS 1.06.43

**100 m rygg, menn:**
1 Eivind Eysturoy HS 1.03.57
2 Bogi Lenvig HS 1.05.36
3 Dia Jacobsen HS 1.08.72

**200 m firvald, kvinnur:**
1 Shaila Millum Garðarnar TS 2.49.14
2 Lisbeth Joensen HS 2.56.93
3 Durita Hansen HS 2.59.13

**200 m bringu, menn:**
1. Jógvan Joensen, HS 2.40.32
2. Hallur Stakksund, HS 2.40.61
3. Andrass Thomsen, HS 2.44.89

**4x100 m frí, kvinnur:**
1 HS 1 4.22.96
Rannvá Jacobsen, Rúna Jacobsen, Karin Gaardlykke og Sólvá Dam
2 TS 1 4.27.90
Shaila Millum Garðarnar, Cecilia N. Poulsen, Barbara Nielsen og Benthe Sikivat Andersen
3 HS 2 4.34.71
Katrin Sørensen, Elisabeth Rasmussen, Maria í Brekkunum og Lisbeth Joensen

**4x100 m frí, menn:**
1 HS 1 3.55.10
Eivind Eysturoy, Kristian Martin Joensen, Bogi Lenvig og Andrass Thomsen
2 HS 2 4.05.84
Jógvan Joensen, Mourits Danberg, Jóannes á Fløtti og Kim Bogi Jacobsen
3 HS 4 4.12.30
Asbjørn Hansen, Hallur Stakksund, Niclas Olsen og Jans Olsen



*Andrass Thomsen úr Havnar Svimjifelag varð kostin ársins svimjari hjá monnum*

***Mynd: Sofus Johannesen***

# Skulu ansa sær

*Eitt og hvørt ítróttarfólk skal sjálvt syrgja fyri, at tað ikki er dopað, sigur Sølvi Winther Olsen, ítróttarlækni*



Eyðun Klakstein

Føroysk ítróttarfólk verða noydd at ansa betri eftir, hvat tey taka av heilivági, tá ÍSF fer at seta dopingeftirlitið á stovn.

Aðalfundurin hjá Ítróttarsambandinum samtykti seinasta vikuskiftið, at framyvir skulu dopingkanningar gerast av føroyskum ítróttarfólkum í Føroyum.

– Hetta fer at merkja, at føroysk ítróttarfólk fara at vera betri fyrireikað til altjóða kappingarnar, men tað hevur eisini við sær, at tey verða noydd at ansa væl eftir. Tað er vandi fyri at verða tikin fyri doping, um fólk ikki hugsa um, hvønn heiligvág tey taka, sigur Sølvi Winther Olsen, sum hevur verið læknaligur ráðgevi hjá ÍSF í sambandi við dopingeftirlitið.

– Tú kanst altíð hava illgrunan um, at føroysk ítróttarfólk dopa seg við vilja, men tað eru ivaleyst fleiri, sum ikki hugsa um, at tey hava onkur ólóglig evni í kroppinum, tí tey taka onkran heiligvág.

### Vanlig evni á forboðslistanum

Sølvi Winther Olsen roknar við, at mong fara at gerast kløkk, tá tey síggja forboðslistan, tí á hesum lista eru nógvur heilivágur, sum er púra vanligur at nýta.

– Um ítróttarfólk gerast varug við, at tey taka onkran heilivág, sum er á forboðslistanum, so skulu tey fara til læknan hjá sær og vita, um tey ikki kunnu fáa annað heiligvág, sum ikki er á listanum, sigur Sølvi Winther Olsen.

– Men tað er týdningarmikið, at ítróttarfólk gera sær greitt, at tað eru tey – og bara tey – sum hava ábyrgdina, um tey verða tikin fyri heiligvág. Tey skulu syrgja fyri at ansa sær og ikki taka heilivág, sum er á forboðslistanum.

Ítróttarlæknin hjá ÍSF slær tó fast, at tað ber til at hava onkra sjúku, fáa heilivág og framvegis íðka ítróttar. Tað skal bara ansast eftir at rætti heilivágurin verður tikin, og at hann verður tikin soleiðis, at tað ikki er í stríð við dopinglógirnar.

Sambært forsetanum í ÍSF, Heðini Mortensen, fer tað at ganga nakað av tíð, áðrenn dopingeftirlitið fer at virka, men næsta ár kunnu føroysk ítróttarfólk altíð rokna við, at tey verða biðin um at koma til dopingkanning.

– Dopingeftirlitið skal tryggja, at øll føroysk ítróttarfólk kappast á jøvnum føti, og at eingin er, sum tekur ólóglig evni, sigur Sølvi Winther Olsen, ítróttarlækni.